# Kreppan dryppar á Grønland

Grønlendska heimastýrið ætlar nú at vinna pening uppá broytingarnar í veðurlagnum, skrivar Fiskaren. Grønland er millum harðast raktu økini, og innlandsísurin bráðnar eisini orsakað av hesum. Nú skal ísurin sum bráðnar – og sum kann vera um 10.000 ára gamal – latast í fløskur, og seljast ríkum amerikumonnum og japanarum. Í løtuni verður arbeitt við at útvega fígging.

# Krabbi við perlu

Ein norsk kvinna fekk ein minni hvøkk, tá hon skuldi njóta eina góða máltíð við krabbakjøti. Tá hon skuldi seta á klónna í einum krabba, kom ein vøkur perla rullandi út. Eftir øllum at døma er ein ókendur lutur komin inn undir skelina og er so líðandi vorðin innkapslaður av kálki, haðani vakra perlan stavar.

# s á sjómanslívið



*Føroya Sjómannadagur í Klaksvík savnar nógv fólk, bæði ung, tilkomin og eldri. Hetta er eitt gott tiltak, sum fellir væl inn í myndina av Klaksvíkini sum føroyski fiskivinnubýurin av øllum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Børnini hava stóran áhuga í livandi fiskum, krabbum og skeljadýrum – og í ár royna fyrireikararnir eisini at fáa fatur á onkrum sjófuglum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

og sjóvinnu annars at gera.

- Tiltakið í fjør kostaði einar 700.000 krónur, og hetta fingu vit alt fíggjað við stuðli. Eg haldi ikki, vit hava vent okkum til nakra fyritøku, sum hevur sýtt fyri at stuðla, leggur hann aftrat.

Føroya Sjómannadagur setir í fyrsta lagi fokus á sjómanslívið og tað arbeiði, sum sjófólk gera í tí dagliga.

- Soleiðis hava allar kappingarnar, sum eru á skránni, eitt hvørt við sjómanslívið og tað arbeiði, sum sjófólk takast við, at gera. Hetta er í fyrsta lagi dagurin hjá sjófólki og familjum teirra, men øll eru vælkomin at verða við.

John William sigur, at hugt verður eisini aftur í søguna, eitt nú við sjómanssøgum, sjómansvísum og framsýningum.

- Eisini verður skipað fyri fleiri føroyameistarakappingum. Ein av hesum er í kelving, har tveir mans royna at hála ein pinn úr hondini á hvørjum øðrum. Maðurin, sum seinastu tvær ferðirnar er endaður á øðrum plássi í hesi kapping, er Jóhan Páll Joensen, sum væntandi fer at royna at taka "meistaran", nú kappast verður av nýggjum leygardagin, sigur hann.

Eins og í fjør, fer Grindamannafelagið aftur í ár at vísa fólki, hvussu ein grindahvalur verður skorin upp.

## Upprunin til dagin

Hvør er so upprunin til Føroya Sjómannadag. Henda spurning settu vit eisini John Williami.

- Sum eg havi skilt, komu Niclas Heri Jákupsson og pápi mín, Olivur Joensen, at práta saman ein dagin, teir vóru á flogi saman. Tá komu teir at tosa um, at ymiskir býir og bygdir skipa fyri ávísum tiltøkum, sum onkusvegna hava tilknýti til staðið. Teir settu sær so spurningin, hvat Klaksvíkin hevur fram um – ella meira – enn aðrar bygdir og býir.

John William sigur, at hesir báðir, sum eisini hava verið dyggir stuðlar undir tiltakinum síðan, komu til ta niðurstøðu, at Klaksvíkin í fyrsta lagi er kend fyri útróður og línuveiði annars.

- Eg haldi, at tað eru eini fimm ár, síðan hugskotið til Føroya Sjómannadag byrjaði at fáa skap, og nú verður so dagurin hildin á triðja sinni, sigur John William Joensen, kunningarleiðari.

# Flestu tiltøkini eru leygardag

**Tað verður borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen, sum fer at bjóða vælkomin leygarmorgunin, og síðan setir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, Føroya Sjómannadag**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrstu tiltøkini á Føroya Sjómannadegi byrja longu í annaðkvøld, tá sjómanssøgur og sjómansvísur verða at hoyra í Atlantis. Tað verður Óli Olsen, rithøvundur, sum fer at greiða frá ævisøgu um Fisher Heinesen.

Hósdagin letur Bátasavnið í Leirvík upp sum partur av tiltøkunum á Føroya Sjómannadegi. Eisini verður fiskikapping á Kósini fyri gentur og dreingir, og hóskvøldið endar við, at fløskupostar verða tveittir í Kalsoyarfirði.

Fríggjadagin verður lagt fyri við fiskivinnuráðstevnu, sum verður í Skálanum, og fríggjakvøldið er Bátasavnið í Leirvík eisini opið.

Leygardagurin er tann stóri dagurin, tá allar kappingarnar eru á skránni.

Stundisliga leygarmorgunin leggja tey føroysku træskipini, Dragin, Westward Ho, Jóhanna, Norðlýsið, Anita og Fram, til bryggju á Stongunum.

Klokkan 9 leygarmorgunin verður stórt morgunmatarborð á Stangarbrúnni.

Tað verður borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen, sum fer at bjóða vælkomin, og síðan setir landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, dagin.

Leygarmorgunin verður eisini SkipaQvistin 2007, og hetta er undankappingin, har øll kunnu luttaka.

Umframt træskipini, sum koma at prýða Klaksvíkina, fara eisini stórir føroyskir bátar við árum og seglum at leggja til bryggju á Stongunum.

Eitt sindur verður av hvørjum, tá ið ræður um skip, bátar og sigling, tí eitt av tiltøkunum leygarmorgunin verður framført av nøkrum kajak-rógvarum, sum fara at sýna fram kynstur út fyri Stangarbrúnni.

Leygarmorgunin verður eisini togtogan millum skipsmanningar.

Seint fyrrapartin fer Grindamannafelagið at skera upp grindahval, og um somu tíð verður svimjikapping um vánna.

WaterShow verður eisini á bryggjuni stutt fyri middag leygardagin, og her verða tað Klaksvíkar Fimleikarfelag, sum fer at skipa fyri undirhaldslopum. Eisini verður kapprógving við fiskakassum.

Fyrsta FM-kappingin verður eisini fyri middag leygardagin, tá kappast verður í trolbøting. Eftir døgurða verða fleiri aðrar FM-kappingar í eitt nú sjómanstaki, at kasta fanglínu, at halda dreggi, kelving og agnskering.

Tvær av teimum mest spennandi kappingunum eru í at skera agn og í egning.

Seint leygarkvøldið verður ókeypis dandur "på brygga", har Dansihugni fer at sýna fram fólkadans og fer at undirvísa í línudansi.

Sunnudagin verður sjómansgudstænasta í Kristianskirkjuni, har Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikar, og tíðliga um kvøldið verður sjómansmøti í tjaldinum. Møti verður eisini í KFUM&K við Frits Thomsen av Skála.